# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið

Nr. 26 - Januar 2016



Berit tók útbúgving sum skipari- og maskinmeistari

Annfinnur og Páll býta sessir

JT Electric mennir framtíðar útgerð

Aðalfundur í Skipara- og Navigatørfelagnum

Hundakynstur við manningarlógini

Kyrrahavskvoturnar liggja kyrrar

Nýggj sjóvinnu-strategi í væntu

ODDAGREIN

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið

**Blaðnevnd**
Páll Hansen, ábyrgd
Annfinnur Garðalíð
Jóan Petur Patursson
Elias Zachariassen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Føroya Skipara- & Navigatørfelag**
Smærugøta 9 A
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**Blaðhald**
Tey sum ynska at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**Forsíðumynd**
Sev.

**Umsiting og redaksjón**
**Press:** press@press.fo,
Øssur Winthereig, ossur@press.fo
tel. 218486
Ingolf S. Olsen, ingolf@press.fo
tel. 225077
Grækaris D. Magnussen, grakaris@press.fo
tel. 514444

**Umbróting,**
Jan Jacobsen, Prenta

**Prent og liðugtgerð**
Prenta 35 77 74

Upplag: 1900



Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag og limur í blaðnevndini.
*Mynd: Grækaris D. Magnussen*

# Ránið úr Trygdargrunninum

Í Føroyum hava vit gingið á odda, tá tað snýr seg um at tryggja fiskimonnum eina minstuløn. Fyrsta minstulønarskipanin, ið eisini umfataði eina sjúkraviðbót, varð sett í verk av Løgtinginum longu í 1947.

Og til 2010 var okkara minstulønarskipan, sum til tá var umsitin av Lønjavningargrunninum, ein skipan, sum vit av røttum kundu vera errin av. Lønjavningargrunnurin hevði játtan á fíggjarlógini.

Men í 2010 varð landsalmenna minstulønarskipanin sett úr gildi, og í staðin fingu vit Trygdargrunn Fiskivinnunar, sum bæði manningar og reiðarí gjalda inn í.

Og broytingin hevur verið ein vanlukka.

Tí frá at vera ein góð skipan, har menn hóast alt fingu til dagin og vegin, tá fiskiskapur og prísur svíktu, fingu vit eina skipan, sum kundi brúkast til spekulasjón hjá snildum reiðarum.

Frá at hava eina skipan, har menn fingu garanterað minstuløn, tá illa vildi til, fingu vit eina skipan, sum av summum reiðarum, ið annaðhvørt sjálvir eiga virki ella móttøkuskip, verður brúkt til at garantera, at menn ongantíð fara upp um minstulønina.

Hesir halda nevniliga avreiðingarprísinum niðri fyri at skúma róman í góðskingarliðnum. Harvið rinda teir eisini minst møguligt inn í grunnin, men belasta útgjaldið maksimalt.

Hetta er eitt rán av Trygdargrunninum, sum vit ikki framhaldandi kunnu standa modell til. Men politiska skipanin varar av grunninum og hansara virksemi, so tað er haðani broytingarnar skulu koma.



**Annfinnur Garðalíð**
formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag




























# INNIHALD

**4 Berit Hovsgarð**
Tók útbúgving sum skipari og maskinmeistari.

**6 Aðalfundur í Skipara- og Navigatørfelagnum**
Annfinnur Garðalíð helt sína fyrstu ársfrágreiðing á aðalfundinum 28. desember

**14 Kyrrahavskvoturnar liggja kyrrar**
Síðani 2010 hevur einki føroyskt skip verið í Kyrrahavninum og roynt eftir rossamakreli.

**16 Nýggj sjóvinnustrategi í væntu**
Poul Michelsen, uttanríkis- og vinnumálaráðharri, setir nú ein arbeiðsbólk at orða nýggjan politikk og strategi fyri føroysku sjóvinnunar.

**18 Hundakynstur við manningarlógini**
Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum heldur Sjóvinnustýrið arbeiða eftir ov ógreiðum mannagongdum.

**20 JT Electric mennir framtíðar útgerð**
Fyritøkan á Kambsdali hevur megnað at ment amboð bæði til alivinnuna og sjóvinnuna.

**26 Semjan kom í hús**
Maskinmeistarafelagið og KAF skrivaðu undir nýggja tvey ára semju.

**28 Rán ella stuðul úr Trygdargrunninum**
Reiðarar og virki misbrúka Trygdargrunnin.

**34 Brennidepilin**
Berit Hovsgarð dual-útbúgvin skipari og meistari.

**30 Brot úr dagbók**
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum.

**32 Brot úr dagbók**
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum.

**34 Føðingardagar**

**36 Annfinnur og Páll býta sessir**
Annfinnur Garðalíð tekur nú sæti í Fiskivinnuráðnum, og Páll Hansen skal umboða manningarfeløgini í arbeiðsbólki, sum skal orða maritima strategi og politikk fyri Uttanríkis- og Vinnumálaráðið.

tekstur: **GRÆKARIS D. MAGNUSSEN** *-PRESS*

**BERIT HOVSGARÐ**

**Fødd:**
24. apríl 1976

**Parlagsstøða:**
Livir saman við Halgir Ljósstein

**Børn:**
Ein son

**Starv:**
Maskinmeistari hjá SEV

**Útbúgving:**
Maskinmeistari og skipsførari

**Útbúgving nær:**
2001



Berit Hovsgarð trívist væl í starvinum sum maskinmeistari hjá SEV. *Mynd: SEV*

# Tók útbúgving sum skipari og maskinmeistari

**Heilt síðan hon var fimm ára gomul visti hon, at hon skuldi vera skipari. Tá sá hon nevniliga fyrstu ferð pápa sín í eini skiparahúgvu.**

- Í veruleikanum skilji eg ikki, at so fá konufólk ganga útbúgvingarleiðina, sum eg havi gingið. Tað er bæði læruríkt, og tú upplivir nógv. Eg haldi, at ganga gentur og ungar kvinnur við hugsanum um at læra til skipara ella maskinmeistara, so fari eg at mæla teimum til at gera tað.

Tað sigur Berit Hovsgarð, sum vaks upp í Hovi, men sum í dag býr og arbeiðir sum maskinmeistari í Vági. Hon arbeiðir á SEV-verkinum í Vági og er ein teirra, ið syrgir fyri, at suðuroyingar fáa streym.

## Spældi sum aðrar gentur

Hóast hon kom at arbeiða innan mannfólkayrkið, so spældi hon sum aðrar gentur barnaárini í Hovi.

- Eg spældi við barbie-dukkur sum aðrar gentur. Og so spældu vit rættiliga nógv fótbólt, og tað gjørdu øll børnini. Vit spældu sum heild rættiliga nógv úti. Vit fingu eisini dreingirnar at spæla mammubørn. Tað var onki í spælinum, sum bendi á, at eg skuldi fara at arbeiða sum stýrimaður, skipari og maskinmeistari. Tað var snøgt sagt ein avgerð eg tók, tá eg fyrstu ferð sá pápa mín í eini skiparahúgvu, sigur Berit Hovsgarð.

Pápi hennara er Ólavur Hovsgarð, sum í nógv ár sigldi sum skipari við Norrønu.

## Til Nýsælands

Tá Berit Hovsgarð var liðug við barnaskúlan, tók hon 8.- 9. floks prógv, og síðan fór hon við AFS til Nýsælands í eitt ár. Tað var í 1993. Her dámdi henni ómetaliga væl. Hon gekk í einum gentuskúla, har 600 gentur gingu. Hon búði í Wanganui nakað norðan fyri Wellington.

Tá hon kom heimaftur til Føroya, arbeiddi hon ymiskt - millum annað umborð á Norrønu.

Síðan fór Berit í studentaskúla, fyrst í Herlev og síðan í Tårnby. Hetta var frá august 1994 til á sumri í 1997. Hon ætlaði sær framvegis at gerast skipari. Og hon søkti eisini inn sum

skipsføraraaspirantur hjá A. P. Møller og slapp inn.

Tá hon var byrjað sum aspirantur, byrjaði A. P. Møller um sama mundið við sonevndu dual-útbúgvingini, og Berit slapp inn á ta útbúgvingina. Tað bar í sær, at nú kundi hon bæði læra til skipsførara og til maskinmeistara.

Fyrstu seks mánaðirnar av útbúgvingini tók hon á sjófartsskúlanum í Svendborg. Síðan var hon í stórum helvt um helvt av tíðini á brúnni og í maskinrúminum. Útbúgvingin hjá Berit Hovsgarð tók níggju ár og tríggjar mánaðir. Hesa tíðina sigldi hon við ymiskum skipum hjá Mærsk í umleið hálvt fimta ár, og hon var hálvt ár á verkstaðsskúla umframt tað hálva árið á sjófartsskúlanum. Hon var liðug við útbúgvingina í 2006.

**Stýrimaður og maskinmaður**

Tá hon var liðug við útbúgvingina í mars í 2006, fór hon út at sigla, onkuntíð sum stýrimaður og onkuntíð sum maskinmaður. Hon sigldi við Mærsk til 2010. Nakað eftir hetta fór hon at sigla við einari lítlari ferju, Pernille, sum siglir millum Helsingør og Helsingborg. Fyrst sum stýrimaður og síðan eitt skifti sum skipari. Hon sigldi við Pernille í umleið eitt ár.

Berit fekk ein son í 2011, og hon helt alla tíðina, at hann skuldi fáa somu virði í uppvøkstrinum, sum hon hevði fingið. Og tí var hon farin at hugsa um at flyta til Føroya. Tá hon so sá, at Smyril søkti eftir maskinmanni, søkti hon starvið og fekk tað. Hon saknaði eisini at arbeiða í maskinuni, so hetta passaði henni óføra væl.

Hon hevði ikki starvast leingi umborð á Smyrli, tá SEV søkti eftir maskinmeistara til verkið í Vági.

Í dag er Berit Hovsgarð vakthavandi á SEV-verkinum í Vági. Her syrgir hon fyri, at suðuroyingar hava streym alt samdøgrið.

Skal hon taka dagar ímillum at arbeiða á brúnni og í maskinrúminum, so er tað maskinan, henni dámar betur.

- Har situr tú ikki still. Tú lærir sjálvandi eisini nógv á brúnni, men, tá tú arbeiðir við maskinum, so tekur tú sundur og setir saman aftur. Tað er eitt satt nøgdsemi at fáa tað heila at koyra aftur, sigur hon.



- Eg vil mæla øllum gentum og ungum kvinnum, sum umhugsa at ganga hesa leiðina, at gera tað. Hetta er eitt spennandi yrki, eisini fyri eina kvinnu, sigur Berit Hovsgarð *Mynd: SEV*

Í løtuni ger Berit Hovsgarð sær ongar hugsanir um at fara út at sigla aftur.

- Eg plagi at skemta við, at tá eg verði gomul og ikki orki at ganga og renna, so fari eg aftur upp á brúnna, flennir hon.



Eitt skifti sigldi Berit Hovsgarð sum stýrimaður og skipari við ferjuni, Pernille, sum siglir millum Helsingør og Helsingborg. *Mynd: faergegalleriet.dk*

tekstur og myndir: **ØSSUR WINTHEREIG** -*PRESS*




Annfinnur Garðalið, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, helt sína fyrstu ársfrágreiðing á aðalfundinum 29. desember 2015.

# Nýggir sáttmálar

**Annfinnur Garðalið kom víða um og nam við nógv viðurskifti í síni formansfrágreiðing, sum her er endurgivin eitt sindur redigerað og stytt.**

Sáttmálauppleggið fyri fiskiskip til Føroya Reiðarafelag bleiv handað 3. februar. Men tað vóru fleiri fyrireikandi fundir um at orða eitt sáttmálaupplegg. Í 2009 fór Føroya Reiðarafelag í upploysn og eftir tað, blivu so sáttmálar gjørdir við teir ymisku skipabólkarnar hvør sær. Men stórar broytingar blivu gjørdar tá við sáttmálunum. Manningarfeløgini gingu við til at taka lut í oljuútreiðslunum og lækka býtisprosentið og fastlæsing av yvirmannapørtunum.

Hetta hevur kravt nógva tíð og orku av formanni og nevndini. Tað hava verið nógvir fundir millum partarnar, og skjótt kundi staðfestast, at langt var í millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag. Tað, sum serliga skilti partarnar, var spurningurin um oljuna, yvirmannapartarnar, tilfeingisgjaldið, og at skiparar og stýrimenn rinda felagsútreislurnar, eisini av eykapørtunum, og fáa ikki feriuløn av eykapørtunum. Tað, sum vit síggja her, er, at yvirmennirnir skula gjalda av eykapørtum, men fáa ikki av eykapørtunum, og her meina vit, at sáttmálin peikar fullkomuliga skeiva vegin.

**Sáttmálasamráðingarnar slitnaðu**

Tann 3. mars bleiv staðfest, at partarnir komu ikki longur, og semja varð um at boðsenda Semingsstovnin. Tann 7. juli var avtalaður fundur í Vinnuhúsinum millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Reiðarafelag og Semingsstovnin. 13. juli klokkan 10.00 byrjaði seming á Hotel Føroyum. Vit vóru fýra mans, sum møttu fyri Føroya Skipara- og Navigatørfelag: Elias Zachariasen, Jan Haldansen, Anfinn Fagraklett, og eg sjálvur.

Tann 14. juli bleiv tingast aftur og fram um ymisku punktini.

Hóast drúgvar samráðingar við semingsmonnum, vrakaði Føroya Skipara- og Navigatørfelag fyrsta uppskotið, men hinvegin, so góðtók Føroya Reiðarafelag semingsuppskotið.

Tað var ikki fyrr enn semingsmenninir løgdu nýtt uppskot fyri partarnar, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag valdi at skriva undir nýggja semingsuppskotið.

heldur fram á næstu síðu >

Hóast felagið metir, at munandi batar eru gjørdir í sáttmálanum, so vóru viðurskifti, sum felagið ikki fekk við í semingsuppskotið.

## Vánaligur reiðara-taktikkur

Í mai mánaða hevði Føroya Fiskimannafelag skrivað undir sáttmála við Føroya Reiðarafelag, og umleið 14 dagar frammanundan skuldi Maskinmeistarafelagið havt skrivað undir nýggjan sáttmála. Men tá Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevði verið gjøgnum seming og annað, tá bjóðaði Føroya Reiðarafelag Maskinmeistarafelagnum til sjálvtøkuborðið, sum Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevði dekkað, til nýggjar og endaligar samráðingar.

Tað sást greitt á úrslitinum hjá Maskinmeistarafelagnum, at har vóru somu hækkingar fyri somu skipabólkar og aðrar broytingar. So tað má sigast, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag samráddist fyri tvey manningarfeløg á hesum sinni, og hetta eigur at læra okkum nakað til næstu samráðingar.

## Farma/frálandavinnu-skip

Vit handaðu sáttmálauppleggið til Reiðarafelagið fyri farmaskip tann 5. februar.

Reiðarafelagið fyri farmaskip vísti á gongdina í frálandavinnuni, at hon sá alt annað en gott út, og tí var als einki pláss til nakrar ítøkiligar broytingar í einum nýggjum sáttmála.

Vit hava havt fleiri fundir við Vinnuhúsið eftir handanina. Tað bleiv gjørt okkum púra greitt beinanvegin, at ein karmur var lagdur av limunum í Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum er limur í Vinnuhúsinum, at ein lønarhækkan fyri eitt ára sáttmála er 1,98 prosent og fyri tvey ára sáttmála var karmurin 2,25 prosent.

Vit førdu fram, at vit mettu okkum einki at hava við nakran karm av nøkrum slagi at gera, so um okkara sjónarmið ikki kundi góðtakast, so kom tað at hindra samráðingunum. Men eftir hetta vóru nógvir samráðingarfundir, og lítið og einki kom burturúr.

Tann 9. mars bleiv semja gjørd um nýggjan tvey ára sáttmála. Nakrar broytingar eru gjørdar í sáttmálanum. Sum dømi kann nevnast, at um umstøðurnar gera tað átrokandi neyðugt, at manningin má taka lut í arbeiði á keiini, so skal eykasamsýning rindast faldað við 1,2.

Í november mánaða frættist meiri um uppsagnir innan oljuvinnuna, og manningar byrjaðu at ganga 1-2. Eisini frættist, at føroyskar havnir høvdu fingið fyrispurningar frá útlendskum reiðarum um kaipláss til veitingar- og seismikkskip.

## Sáttmáli við Kommunufelagið

Sáttmálin millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið bleiv uppsagdur í november. Hetta er sáttmáli um havnarfútar, og fleiri av hesum størvum eru lønt millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Men eingin fundur er avtalaður enn; men her er nakað at fara eftir. Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur fáar limir í hesum sáttmálanum, men arbeitt verður fyri at fáa fleir limir undir sama sáttmála.

Sáttmálin millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Lønardeildina viðvíkjandi Magnus Heinasyni er eis-



Millum 50 og 60 mans vóru møttir á aðalfundinum.

tekstur og myndir: **ØSSUR WINTHEREIG** *-PRESS*

ini uppsagdur. Tað hava verið tveir fundir síðan, og næsti fundur er ikki avtalaður enn. Lønardeildin vísir á karmin 4,15 prosent fyri tvey ára sáttmála.

Næsta ár verða samráðingar millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Lønardeildina um Strandferðsluna og Vaktar- og Bjargingartænastuna. Hesir sáttmálar skula dagførast.

**Sáttmálar fyri navigatørar á landi**

Føroya Skipara- og Navigatørfelag arbeiðir við at fáa sáttmálar fyri navigatørar, sum starvast á landi, har kravið til starvið er hægsta nautiska útbúgving. Sum dømi kann nevnast sýnsmenn hjá Sjóvinnustýrinum, DPA, HSEQ og persónar hjá almennum stovnum (SSL) og hjá Føroyskum reiðaríum. Føroya Skipara- og Navigatørfelag metir, at tað er av størsta týdningi, at vit fáa hesi viðurskifti í rættlag, og hetta er eitt ynski frá navigatørunum eisini.



Helvtin av nevndarlimunum stóð fyri vali.



Nýggja nevndin á trappuni uttan fyri nýggju húsini hjá felagnum: Frá høgru:
Ellintur M. Abrahamsen, Ólavur Biskupstøð, Annfinnur Garðalíð, formaður, Kristen Friis, Leivur Christiansen, Annfinn Fagraklett, Niels J. Nielsen, og Elias Zachariasen, næstformaður. Á myndini vænta Jákup Gøthe (nývaldur), Jan Haldansen og Svenning Borg.




## Veitst tú av,

- at tú hjá Betri pensjón hevur fleiri váðastøði at velja ímillum, og harvið betri møguleika fyri at fáa størri avkast á tínari pensjón
- at 1 % meiri í avkasti yvir eitt 40 ára tíðarskeið kann økja tína samansparing við umleið 23 %

**Minst til, at um tú savnar pensjón og tryggingar hjá Betri pensjón og Tryggingarfelagnum Føroyum, fært tú ein Ú-kekk.**

**Set teg í samband við ein av okkara ráðgevum á tel 345 700 ella betri@betri.fo, so vit saman kunnu gjøgnumganga tíni pensjónsviðurskifti.**

Betri pensjón

tekstur og myndir: **ØSSUR WINTHEREIG** *-PRESS*



Esmar Joensen frá Formula greiðir frá veiðidagbókini.

# Veiðudagbókin mennist

Á aðalfundinum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag var Esmar Joensen frá Formula og greiddi frá seinastu menningunum av talgildu veiðidagbókini.

Veiðidagbókin verður í dag brúkt av flest øllum skipabólkum - 4B, trolbátum, stállínuskipum, ísfiskatrolarum, rækjuskipum, flakatrolarum og uppsjóvarskipum.

- Trekt er at fáa skip at brúka skipanina, men í dag eru tað umleið 35 skip sum hava skipanina, segði Esmar Joensen.

- Skipanin skuldi vera smidlig og løtt at handfara. Ein, sum er vanur við pappír dagbókina, skuldi kenna seg aftur. Eitt krav til skipanina var eisini, at hon til eina og hvørja tíð skuldi lúka krøv frá myndugleikunum, greiddi Esmar Joensen frá.

Eitt annað týðandi krav var, at skipanin skuldi vera trygg, tí talan er um viðkvæmar upplýsingar

- Frá bara at avloysa pappírsveiðidagbókina er talan nú um eina meira umfatandi skipan, sum loysir ymsar tørvir, skipini hava. Kjarnin er tó framvegis ein skipan til veiðidagbók.

---

# Facebook umborð

## Sjónet er intenetsamband til skip, sum røkkur út á 60-70 fjórðingar.

Tað eru fleiri skip, sum í dag nýta Sjónet, og teir lata væl at. Teir siga, at sambandið er akkurát líka gott sum heima.

Bæði Føroya Tele og Vodafone veita føroyskum skipum hesa tænastu.

Umboð fyri telefeløgini hava vitjað í Smærugøtu og greitt frá møguleikunum, sum liggja í Sjónetinum.

Ymisku skipini hava eina uttandura antennu, ið tekur í móti signalinum, og so verður sambandið beint víðari út á einstøku kømrini umborð, so hvør maður hevur internetsamband.

Hetta hevur fullkomiliga broytt lívið umborð – bæði arbeiðsliga og privat, siga ymisku manningarnar. Á brúnni verður góða internetsambandið brúkt til eitt dygdargott samskifti við reiðarí, eftirlit og myndugleikar. Tað er eisini vorðið nógv skjótari og lættari at fáa eitt nýtt veðurkort fram.

Skjóta ferðin gevur manningini møguleika at fylgja nógv betur við. Manningin brúkar sambandið at kunna seg um alt, sum fer fram í landi; teir eru á Facebook, hava samband við vinir og kunnu fylgja við politikki, fótbólti ella kappróðri, ja alt sum hevur týdning fyri hvønn einstakan. Og teir hava yvirhøvur somu møguleikar, sum fólk heima við internetinum. So tað er sjálvandi púra óhugsandi at venda aftur til tað gamla.

Hóast teir hava bæði heimið og allan heimin í kahúttuni, so hevur tað ikki gingið út yvir samanhaldið umborð. Tvørturímóti - teir hava meira at tosa um, nú teir fáa alt við.


Norðurlendska Navigatørkongressin í Føroyum verður hildin í nýggju húsunum hjá felagnum. *Mynd Grækaris D. Magnussen*

# Norðurlensk ráðstevna í Føroyum

Føroya Skipara- og Navigatørfelag luttók í "Nordisk Navigatørkongress", sum var hildin í Mariehamn í Álandi tann 21.-23. september. Mannagongdin er tann, at hvørt land sær, hevur eina presentasjón frá sínum heimlandi, alt frá, hvussu gongur í fakfelagnum, so sum arbeiðsloysi, sáttmálaviðurskifti og útlitini frameftir.

Tá tað snýr seg um grundlønirnar, so er ikki tann stóri munurin á lønarlagnum, men hini londini hava ymisk ískoyti, sum vit ikki hava. So er tað skatturin, sum er nógv hægri her, enn eitt nú í Norra, sum vit mangan líkna okkum við.

Tað bleiv tosað nakað um pensjónsviðurskiftini hjá ymisku londunum, og har er langt eftir á mál í Føroyum í mun til hini londini. Norra man vera tað landið, sum er best fyri.

Annars, so søgdu norðmenn seg vera nervøsar fyri gongdini í oljuvinnuni. Alsamt fleiri frálandavinnuskip vera løgd í óásetta tíð, og tað sum kann henda, er, at reiðaríini megna ikki ongan kjartur at hava, so teir stúra fyri at missa skipini á tvingsilssølu, og at tey vera seld fyri lítið og lætt. So kunnu nýggir aktørar bjóða seg fram við bíligum skipum, og norðmenn klára sostatt ikki kappingina.

Í august 2016 verður Norðurlendska Navigatørkongressin í Føroyum, og tá er Føroya Skipara- og Navigatørfelag vertur. Aftur her verður ein avbjóðing, og kongressin verður hildin í nýggju húsunum hjá felagnum.

tekstur og myndir: **ØSSUR WINTHEREIG** *-PRESS*




Høgni Hoydal var gestarøðari á aðalfundinum hjá Skipara- og Navigartørfelagnum.

# Fakfeløgini skulu hava virknan leiklut í nýskipanini

Landsstýrismaðurin i fiskivinnumálum var gestur á aðalfundinum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum. Landsstýrismaðurin rósti felagnum og gjøgnumgekk tær politisku ætlanir, sum nýggja samgongan hevur á fiskivinnuøkinum.

- Vit vita, at her eru stórar ósemjur og sjálvandi stór og sterk áhugamál hjá ymsum pørtum, sum gera seg galdandi – sum vit hava fingið sjón fyri søgn seinastu mánaðirnar.

Høgni Hoydal sipaði til politiska arbeiðið at smíða eina nýggja fiskivinnuskipan, sum skal gerast at taka við 1. januar 2018.

Landsstýrismaðurin gjøgnumgekk, hvat hann helt vera minsta mark fyri, hvat semja skal finnast um.

### Fólksins ogn

Høgni Hoydal nevndi fleiri yvirskriftir um, hvat semja átti at finnast um. Um eitt tað heitasta politiska málið segði landsstýrismaðurin:

- Við teimum royndunum, ið vit sjálvir hava gjørt okkum, og sum lond um allan heim hava gjørt sær, er eitt høvuðsmál, at tilfeingið og fiskirættindini eru ogn hjá fólkinum í øllum komandi ættarliðum og kunnu ikki privatiserast ella fara av landinum.

Høgni Hoydal mælti til at semjast um:

- At útlendskur ognarskapur, partapeningur og avgerðarrættur í feløgum, sum reka føroysk fiskiskip, verður burtur.

- At bert feløg, sum eru skrásett í Føroyum, rinda skatt í Føroyum, hava eigarar búsitandi og skattskyldugar í Føroyum, og sum rinda manningini hýru sambært sáttmála á føroyska arbeiðsmarknaðinum, kunnu bjóða seg fram í føroyskari fiskiveiði.

Landsstýrismaðurin segði seg vóna, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag fór at taka virknan lut í arbeiðinum og orðaskiftinum um eina nýggja fiskivinnuskipan.

### Fullfíggjað uppskot um lóggávu

Í samgonguskjalinum verður sagt, at ein arbeiðsbólkur skal setast at gera tilmæli til politisku skipanina.

Høgni Hoydal útgreinaði arbeiðssetningin hjá arbeiðsbólkinum og hvussu arbeiðið skal skipast.

- Nevndin ella arbeiðsbólkurin skal eftirmeta og endurskoða skipanina av føroysku fiskivinnuni í síni heild – herundir lógina um vinnuligan fiskiskap og aðra viðkomandi lóggávu – og gera fullfíggjað uppskot til lóggávu, skipanir og skiftisskipanir, ið kunnu røkka aðalmálunum og endamálunum við nýskipanini.

Nevndin skal hava regluligar hoyringar í sínum arbeiði. Sambært landsstýrismanninum skulu tveir hoyringsbólkar skipast, sum skulu hoyrast regluliga í arbeiðinum.

Ein bólkur skal hava umboð fyri allar partar í vinnuni: feløgini hjá vinnuni á sjógvi og landi, útgerðar-, arbeiðsgevarara- og fakfelagsskipanina. Hin bólkurin skal hava umboð fyri politisku flokkarnar á tingi.

- Nevndin eigur í arbeiðnum somuleiðis at skipa fyri almennum hoyringum og ráðstevnum um høvuðstættirnar í arbeiðinum, segði Høgni Hoydal.

**Viðmerking og spurningar**

Aftan á var høvi at seta spurningar og gera viðmerkingar. Mannbjørn í Grund spurdi um, hvussu bókstaviliga tað skuldi skiljast, at fiskivinnan skal vera á føroyskum hondum.

- Skal tað skiljast soleiðis, at tað skulu vera føroyskar hendur, sum skulu taka fiskin upp av grunninum?

- Ognarluturin og rætturin at troyta fiskiríkidømi undir Føroyum skal vera á føroyskum hondum. Vit hava ikki sett nakað krav um, hvar man skal vera føddur, men høvuðstreytin er, at tað eru føroysku sáttmálarnir og føroysku reglurnar á arbeiðsmarknaðinum, sum eru galdandi, svaraði landsstýrismaðurin.

Rúni Jacobsen, skipari, fanst at, at landsststýrismaðurin loyvdi so nógvum øðrum londum at fiska svartkjaft undir Føroyum. Hann nevndi, at um nøkur ár kundi upsastovnurin vera so illa fyri, at eingin upsi var eftir, tí upsin etur svartkjaft. Hann mælti heldur til at lata onnur lond fiska so nógvan makrel, sum tey vilja.

- Er tað burðardygt at lata allar tjóðir fiska svartkjaft undir Føroyum?

Landsstýrismaðurin viðgekk, at fleiri høvdu fingið loyvi at fiska svartkjaft á føroyskum øki, og tað er ein øgilig drift, sum hann tók til, men Høgni Hoydal valdi tað bleyta svarið, sum hann gjørdi í flestu førum:

- Vit fáa einki gjørt við hetta fyri 2016, tí tær avtalurnar eru gjørdar, men hatta er ein spurningur, sum vit eiga at taka upp, svaraði Høgni Hoydal.

Flestu av spurningunum fingu bleyt og politikarakend svar.

**Kann ikki vera meiri ósamdur**

Ellindur Abrahamsen legði sum vanligt ikki fingarnar ímillum.

- Tá tað kemur til fiskivinnupolitikk, so ber tað illa til at vera meiri ósamdur, enn eg eri, við sitandi samgongu, legði Ellindur Abrahamsen fyri.

Høvuðssjónarmiðið hjá fyrrverandi formanninum í felagnum var, at sjálvt um alt fiskiríkidømi er ogn Føroya fólks, so eigur tað ongantíð at vera soleiðis, at fiskimaðurin ella reiðarin eiga at gjalda fyri at sleppa at fiska, og reiðarin skal ongantíð koma at eiga fiskiloyvið.

- Reiðararnir eiga at hava fiskiloyvini í loypandi 10 ár, tí tað ber ikki til at forbetra seg, um tú ikki veitst, um tú hevur skip í morgin, vísti Ellindur Abrahamsen á. Tá tað kemur til gjaldið til landskassan helt Ellindur, at landsstýrið skuldi leggja seg eftir at taka gjaldið í fyrsta liði, eftir at fiskurin var avreiddur, og ongantíð áðrenn hann er fiskaður. Landið má finna út av at leggja gjaldið á aftaná, at manning og reiðaríð eru avroknað.

Høgni Hoydal segði, at hansara sjónarmið er, at reiðarin eigur at gjalda fyri rættindini og ikki manningin. Landsstýrismaðurin viðgekk eisini, at tað var skeivt, at politiska skipanin ikki hevði verið greiðari, tá tilfeingisavgjald var lagt á uppsjóvarskipini.

Høgni Hoydal vísti ikki aftur, at ein møguleiki kanska var at leggja gjaldið í einum seinni liði, sum Ellindur skjeyt upp.

# Skuffureiðaríini eiga plássið á hentleikalistanum

Føroysku manningarfeløgini (FMU) eru av teirri fatan, at Merkið eigur ikki at vera á FOC-listanum yvir hentleikafløgg, men ístaðin eru tað nøkur føroysk reiðarí, sum eiga tað plássið, tey sonevndu skuffureiðaríðini

Fleir áheitanir eru komnar til nevndina í FMU, (Faroes Maritime Union), sum er samstarvið millum føroysku manningarfeløgini, um at samskifta við ITF-myndugleikarnar at fáa føroyska flaggið av altjóða hentleikaflagglistanum hjá FOC (Flag of convenience).

FMU nevndin er samd um, at vit eiga ikki at ganga ørindi fyri Reiðarafelagið og Sjóvinnustýrið. Fyrst av øllum er kravið frá føroysku manningarfeløgunum, at føroysku reiðararnir virða sáttmálarnar og rættindini og ikki minst limaskapin hjá manningini, og at Sjóvinnustýrið ikki nýtir Føroyar sum eina endastøð fyri niðurslitin skip, sum onga aðrastaðni sleppa at flagga inn, tí alt hetta setur flaggið í eina verri støðu. Tá kunnu vit vera klárir við samstarvi.

**Uppeftir á FOC-listanum**

Í 2014 vóru tað 86 skip skrásett í FAS skipanini og í 2015 vóru tað 88 skip skrásett, og fleiri av hesum skipum, sum komu í FAS skipanina, hava veitt fleir arbeiðspláss til føroyingar. Í 2014 vóru 89 PSC-kanningar gjørdar umborð á FAS-skipum, og eingin var afturhildin, og í 2015 vóru 87 kanningar gjørdar og tríggir afturhildnir.

Viðvíkjandi FOC-hentleikaflaggi, so verður tað arbeitt við at fáa føroyska flaggið av FOC-listanum, og í 2015 komu vit 12 stig longur upp tann rætta vegin.

Men tað er eingin loyna, at tað gongur munandi betur hjá føroyskum handilsskipum at lúka altjóða treytir.

tekstur og myndir: **ØSSUR WINTHEREIG** *-PRESS*





Athena hjá Thor í Hósvík var eitt av skipunum, sum fiskaði rossamakrel í Kyrrahavinum, men tá skipið brann, lá fiskiloyvi eftir og endaði, sum makrelloyvi undir Føroyum. *Mynd: Hanus Kruuse*

# Kyrrahavskvoturnar liggja kyrrar

**Síðani 2010 hevur einki føroyskt skip verið í Kyrrahavninum og roynt eftir rossamakreli. Loyvini, sum vóru útskrivað til rossamakrel í Kyrrahavinum eru nú vekslað til makrelloyvi undir Føroyum.**

Á aðalfundinum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum spurdi Annfinnur Garðalíð landsstýrismannin um, hvat hendi við makrelloyvunum í føroyskum sjógvi, um kvoturnar í Kyrrahavinum fóru til onnur reiðarí ella blivu brúkt í fiskivinnusamráðingum við onnur lond.

- Eg havi ikki gjørt tær stóru broytingarnar, tí eg havi ikki havt sakligar grundgevingar at gjørt tað, svaraði Høgni Hoydal.

Í 2006 fóru trý skip hjá Thor í Hósvík í Kyrrahavið at royna eftir rossamakreli. Fyrstu tíðina gekk hampuligt, men í 2010 vóru kvotur settar á rossamakrelin, og síðani hevur einki føroyskt skip verið aftur í Kyrrahavinum. Tvey av skipunum brunnu og eitt var selt, men fiskiloyvini vóru verandi í hondunum á Thor.

## Hjálpa at fiska makrel

Í 2010 komu skipini í føroyskan sjógv at taka ímóti makreli, og í 2011 fingu tey loyvi at fiska sjálvi, sjálvt um fiskiloyvini bert vóru galdandi fyri rossamakrel í Kyrrahavinum. Hugskotið tá var, at skipini skuldu hjálpa føroysku skipunum at fiska og taka móti makreli – fyribils í eitt ár.

South Pelagic í Vági keypti í 2014 Grunnabarð, sum í fyrsta lagi fekk

loyvi at royndarfiska eftir hvítingsbróðuri, men vágbingar dýktu á fyri at fáa part av makrelfiskiskapinum undir Føroyum. Eitt skifti var Grunnabarð seldur til Thor í Hósvík og fiskaði makrel undir Føroyum upp á kyrrahavsloyvini hjá trolarunum hjá Thor.

Seinni í 2014 bleiv Athena til Asbjørn Senior, og Poseidon bleiv til Grunnabarð. Skipini brúktu kyrrahavsloyvini sum lopfjøl at fiska makrel undir Føroyum. Onki skip fór aftur í Kyrrahavið at fiska.

Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður, segði í august 2014 við útvarpið, at hann kundi ikki taka makrelloyvið frá teimum báðum skipunum, tí so vóru øll skip ikki viðgjørd eins.

**Onnur kunnu sleppa upp í part**

Ein spurningur hevur so verið, hvat hendir við makrelkvotunum í føroyskum sjógvi, um kyrrahavskvoturnar enda onkra aðrastaðni.

Tey fyrstu árini var frítt fiskarí, men eftir at kvota var sett á, minkaði áhugin niður í einki at fiska rossamakrelin. Viðvíkjandi kyrrahavskvotunum er støðan tann, at tær hava ikki verið fiskaðar seinastu árini.

Landsstýrið lýsti eina kunngerð, har onnur kundu bjóða seg fram at fiska kvotuna í Kyrrahavinum.

Í kunngerðini tilskilaði Landsstýrið sær rætt til at kunna samráðast við onnur lond um at býta um kvotur, soleiðis at um okkurt annað land fiskaði hesar kvoturnar, so kundu Føroyar fáa rættindi onkra aðrastaðni.

Høgni Hoydal upplýsti, at í hesi tilgongdini vóru onkrar privatar avtalur gjørdar um kyrrahavskvoturnar, men landsstýrið vildi ikki góðkenna, at kvoturnar vórðu handlaðar privat.

- Skulu vit gera avtalur um kvoturnar í Kyrrahavinum, so mugu tað vera avtalur á myndugleikastigi. Vit kunnu ikki formidla nakrar privatar avtalur, so tað hava vit sagt nei til, segði Høgni Hoydal, landsstýrismaður.

**Yvirlit yvir rættindi og loyvi**

- Viðvíkjandi spurninginum um avleiðingar fyri tey rættindndi, sum eru givin, har havi eg fyribils sagt, at broytingar verða ikki gjørdar her og nú, tí vit mugu fyrst fáa yvirlit yvir, hvørji rættindi yvirhøvur eru, segði landsstýrismaðurin.

Landsstýrismaðurin segði seg sakna eitt yvirlit yvir alt, sum er farið fram í føroyskari fiskivinnu. Hvar rættindini eru, hvar loyvini eru farin, hvussu tey hava skift hendur og so framvegis.

- Áðrenn eg havi fingið tað, havi eg ikki tikið støðu til, hvat skal henda. Tí tað finst eingin saklig grund til tað, sum støðan er í løtuni, segði Høgni Hoydal.

Tá Høgni Hoydal var beinleiðis spurdur, um eitt nú Thor missir tey makrelloyvi, sum eru fingin í staðin fyri kyrrahavsloyvini, um kyrrahavsloyvini enda hjá onkrum øðrum, svaraði landsstýrismaðurin, at tað hevði hann ikki tikið støðu til.




Grunnabarð kom til Vágs og fekk royndarfiskiloyvi eftir hvítingsbróðuri, men fekk seinni loyvi at fiska makrel upp á kyrrahavsloyvi hjá Thor í Hósvík. *Mynd: Regin Torkilsson*

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*




Uttanríkis- og Vinnumálaráðið vil hava ein yvirskipaðan politikk og strategi fyri maritimu Føroyar.

# Nýggj sjóvinnu-strategi í væntu

**Poul Michelsen, uttanríkis- og vinnumálaráðharri, setir nú ein arbeiðsbólk at orða nýggjan politikk og strategi fyri føroysku sjóvinnuna. Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum vil fegin vera við í arbeiðnum fyri at tryggja, at fakliga støðið og ikki lægsti felagsnevnarin verður stavnhaldið.**

- Besta strategiin fyri áhaldandi menning av føroysku sjóvinnuni er at seta standardirnar eftir hægsta felagsnevnara og ikki lægsta. Tað merkir, at vit bæði skulu leggja okkum eftir einum høgum støði í maritimu útbúgvingunum og lata hetta síggjast aftur í førleikakrøvunum til manningar á føroyskum skipum.

Tað sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, nú felagið saman við øðrum feløgum, umboðum fyri vinnuna og avvarandi myndugleikar hevur fingið innbjóðing frá Poul Michelsen, uttanríkis- og vinnumálaráðharra, um at verða við í arbeiðnum at orða uppskot til yvirskipaðan politikk og strategi fyri maritimu Føroyar.

**Kappingarføri**

Sambært grein á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum er tað ein áheitan frá Reiðarafelagnum fyri Farmaskip, ið hevur fingið landsstýrismannin at taka stigið, og í greinini sigur landsstýrismaðurin soleiðis:

"Sjóvinnan virkar á einum altjóða marknaði, og tí er avgerandi, at føroyska vinnan er kappingarfør. Umráðandi er tí, at Føroyar liva upp til altjóða sáttmálar og lóggávu á økinum, og at óneyðugar byrðar ikki verða lagdar á vinnuna. Í dag nema nógv sjófólk sær útbúgving í Føroyum, og ein hópur av skeiðum til sjóvinnuna verða bjóðað út. Tí er útbúgvingartilboð til sjóvinnuna eisini eitt upplagt evni at viðgera."



- Vit skulu bæði leggja okkum eftir einum høgum støði í maritimu útbúgvingunum og lata hetta síggjast aftur í førleikakrøvunum til manningar á føroyskum skipum, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

**Niðurstiging**

- Hatta ljóðar jú gott, og sjálvandi er tað ein uppgáva hjá politiska myndugleikanum at vera við til at tryggja kappingarførið hjá føroysku sjóvinnuni. Men higartil hevur tað tíverri merkt niðurstiging av lógarkørmunum, soleiðis at førleikakrøvini til eitt nú maskinmanning eru vorðin lakari.

- Tað kann væl vera, at tann strategiin tryggjar onkrum skipi bíligari rakstur og harvið betri kappingarføri, men í longdini verður tað ein stokkutur hiti, sum í øllum førum ikki tænir føroyska sjófólkinum og teirra góða altjóða umdømi, sigur Páll Hansen.

Við hesum sipar hann millum annað til nýligu handfaringina hjá Sjóvinnustýrinum av manningarskjølunum hjá Silver Lake og Silver River. Tað málið er umrøtt í greinini niðanfyri.

- Men júst fyri at fyribyrgja slíkum, heilsi eg initiativinum hjá nýggja vinnumálaráðharranum vælkomnum. Og eg vil fegin vera við til at garantera, at eitt høgt fakligt støði og harvið trygdin verður sett í hásætið, tá hugsað verður kappingarføri og menning, sigur Páll Hansen.




tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*




Silver River. *Mynd: Facebook-vangin hjá Fjord Shipping Management.*

# Hundakynstur við manningarlógini

**Fyrst vildi Sjóvinnustýrið ikki fylgja avgerðini hjá Sjóvinnuráðnum í tess avgerð um maskinmanningina á Silver Lake og Silver River. Síðani rættaði Sjóvinnustýrið kortini manningarskjølini hjá skipunum, so tey luku krøvini, men enn spøkir ætlanin um at loyva maskinmanning við verri førleikum umborð.**

Tað var í fjør summar, at Maskinmeistarafelagið gjørdist varugt við, at Sjóvinnustýrið hevði skrivað út manningarskjøl við skeivum átekningum til føroyskt skrásettu farmaskipini Silver Lake og Silver River hjá norska reiðaríinum Fjord Shipping.

Í manningarskjølunum, sum vóru skrivað út 7. juli í fjør, vóru ásettu førleikakrøvini væl linari, enn STCW-sáttmálin ásetir fyri hesi skip, tað er skip við einari maskinorku á 3000 kW ella meira.

**Viðhald**

Maskinmeistarafelagið kærdi avgerðina hjá Sjóvinnustýrinum til Sjóvinnuráðið, sum er evsti fyrisitingarligi myndugleikin á økinum, og í sínari niðurstøðu 8. oktober í fjør gav ráðið Maskinmeistarafelagnum fult viðhald. Men Sjóvinnustýrið tók kortini ongi stig til at rætta mistakið. Tvørturímóti. Eftir at Maskinmeistarafelagið hevði gjørt Uttanríkis- og Vinnumálaráðið, sum varðar av manningarlógini, varugt við málið, gjørdi Sjóvinnustýrið í telduposti 2. november Maskinmeistarafelagnum greitt, at stýrið ikki ætlaði at gera eftir avgerðini hjá Sjóvinnuráðnum.

Maskinmeistarafelagið sá sær tá ongin onnur ráð enn at varskógva fjølmiðlarnar. Og tá kom vend í.

**Stokkut gleði**

Maskinmeistarafelagið sendi eitt tíðindaskriv út sunnudagin 8. november, og longu dagin eftir sendi Sjóvinnustýrið felagnum avrit av




Silver Lake. *Mynd: Facebook-vangin hjá Fjord Shipping Management.*

nýggjum manningarskjølum til Silver Lake og Silver River, og hesaferð vóru skjølini í samsvari við STCW-krøvini.

Men gleðin var stokkut, tí Maskinmeistarafelagið kom skjótt eftir, at reiðaríið hjá Fjord Line framhaldandi roynir at fáa linkað førleikakrøvini til maskinmanningina á skipunum.

Manningarlógin varð broytt í fjør vár, so Sjóvinnustýrið nú hevur heimild at broyta ásetingina av motorstødd á einum skipi í mun til royndarflatutalvuna hjá motorverksmiðjuni, sum frammanundan hevði verið einasta galdandi áseting.

**Kreativitetur**

Maskimmeistarafelagið var harðliga ímóti hesi broyting og gjørdi vart við seg bæði í hoyringsskrivi og alment.

- Men vit høvdu tó ikki væntað, at lógarbroytingin fór at verða brúkt so kreativt, sum tað nú eru útlit fyri. Vit høvdu fingið ta greiðu fatan, at heimildin hjá Sjóvinnustýrinum at broyta framtøkumegina bert var ætlað at skula brúkast fyri at tryggja rímuligar treytir, tá veruligi tørvurin á framtøkumegi hjá einum skipi liggur langt niðanfyri tað, sum royndarflatutalvan vísir, soleiðis at framtøkumegin lættliga kann lækkast við eini 25 - 50 prosentum og framvegis nøkta tørvin.

- Men nú hevur Sjóvinnustýrið givið loyvi til at lækka framtøkumegina hjá Silver Lake og Silver River við bara einum kilowatti – úr 3000 kW niður í 2999 kW. Tað er beint ímóti andanum í lógini.

- Harafturat viðger Sjóvinnustýrið eisini eina umsókn um loyvi til bert at sigla við einum maskinisti við hesum somu skipunum. Verður tann umsóknin gingin á møti, so mugu vit staðfesta, at tað til fulnar hevur eydnast reiðaranum at draga myndugleikan eftir hárinum til at ganga við til júst tað, sum reiðarin upprunaliga ynskti, sigur Páll Hansen.

**Greiðari mannagongdir**

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum heldur Sjóvinnustýrið arbeiða eftir ov ógreiðum mannagongdum.

- Eg má viðganga, at tað var støður sum hesa, vit óttaðust, tá vit høvdu broytingarnar í manningarlógini til hoyringar. Sjóvinnustýrið hevur sum siðvenju í fyrsta lagi at hugsa um kappingarførið hjá reiðaríunum, og í øðrum lagi um trygdina. Tað eigur at vera øvugt. Fyri Sjóvinnustýrið sum myndugleika eigur kappingarførið hjá einstøku reiðaríunum at vera fullkomiliga óviðkomandi, slær Páll Hansen fast.

Hann eftirlýsir eina kunngerð, sum greitt ásetir atlit og mannagongdir, sum Sjóvinnustýrið skal fylgja í sambandi við broyting av framtøkumegini á skipum.



- Nú hevur Sjóvinnustýrið givið loyvi til at lækka framtøkumegina hjá Silver Lake og Silver River við bara einum kilowatti – úr 3000 kW niður í 2999 kW. Tað er beint ímóti andanum í lógini, sigur Páll Hansen.

tekstur og myndir: **GRÆKARIS D. MAGNUSSEN** *-PRESS*



# JT Electric mennir framtíðar útgerð

Hendan fyritøkan á Kambsdali hevur megnað at ment amboð bæði til alivinnuna og sjóvinnuna, sum fáa altjóða alifyritøkur og altjóða sjóvinnu at venda eygunum hendanvegin.

Tó at hon í dag mennir tól, sum fáa altjóða fyritøkur at hyggja hendanvegin, so byrjaði JT Electric í tí smáa.

Tað var Jóannes Thomsen úr Klaksvík, sum búsettist í Fuglafirði at selja eltekniska tænastu og vørur til sildaverksmiðjuna Havsbrún. Sambært heimasíðu felagsins vóru hølini tá bert ein lítil skúrur, og hesin var bæði goymsla og skrivstova. Eftir sløkum ári var ein el-lærlingur settur í starv, og spakuliga byrjaði fyritøkan at vaksa.

Av tí at nógv skip komu á Fuglafjørð um hetta mundið, bæði føroysk og útlendsk, ja, so gjørdist hetta eisini ein patrur av arbeiðinum hjá JT Electric. Virkið vaks, og eftir fimm árum hevði fyritøkan umframt uppgávur

heldur fram á næstu síðu >



Alibrúk við undirsjóvarljósum frá JT Electric. Vit síggja Fuglafjørð í baksýni. *Mynd: Ólavur Frederiksen*

fyri sildaverksmiðjuna Havsbrún og fyri mongu skipini, ið komu til Fuglafjarðar, eisini aðrar uppgávur, eitt nú gøtuljósini í Fuglafirði, innlegging í sethús, Ísvirkið úti á Land, flakavirki og so framvegis.

Fyritøkan hevur alla tíðina verið opin fyri nýggjum avbjóðingum, og serliga sjónligt gjørdist tað, tá í virkið nam sær vitan um frekvensumformarar og PLC-stýringar. Tað gingu til dømis 12 ár, áðrenn aðrir el-innleggjarar fóru at fáast við slíkt.

Meira torgreidd tøknin gjørdist, meira vitan kravdist. Tí fóru starvsfólk hjá fyritøkuni til Danmarkar, Noregs og Svøríkis at nema sær meira vitan um til dømis alt tað nýggjasta við maskinannleggum.

**Partafelag í 1985**

Jóannes Thomsen gjørdist partafelag í 1985. Vaksandi virksemið í landinum økti um talið á elektrikarum og lærlingum, og nógvir virkisbygningar vóru at leggja el inn í. Haraftrat var tænastan til alivinnuna av álvara farin at taka seg upp. Automatiskar fóðurskipanir gjørdust alt vanligari hjá alarunum, og nógv arbeiði var av tí. Seinast í áttatiárunum starvaðust eini 20 fólk í fyritøkuni.

Hóast kreppurárini fyrst í nítiárunum og alikreppuna tíðliga í 2000 eydnaðist JT Electric at yvirliva, hóast tað stundum kundi vera strævið. Góða samanhaldið millum starvsfólkini gjørdi sítt til. Og júst støðug starvsfólk hevur eyðkent fyritøkuna, síðan hon varð sett á stovn.

Eftir kreppuárini í nítiárunum fekst fyritøkan serliga við tvey høvuðsøki: Vanligt el-arbeiði, mest á virkjum, og programmering av PLC-stýringum til maskinannlegg. Av vanliga el-arbeiðinum var alivinnan nú vorðin ein týðandi partur, og júst nógva arbeiðið í alivinnuni fekk umsetningin hjá JT Electric at vaksa munandi.

**Ljós í alivinnuni**

Tað var ein kollvelting innan alivinnuna, tá menn byrjaðu at brúka ljós fyri at minka um kynsbúningina. JT Electric byrjaði at seta projektørar við aliringarnar, men føroyska veðrið er ikki altíð so lætt at arbeiða saman við. So smátt byrjaði fyritøkan á Kambsdali at arbeiða við ætlanum um undirvatnsljós. Í hesum arbeiðnum

tekstur og myndir: **GRÆKARIS D. MAGNUSSEN** -*PRESS*




JT Electric liggur væl fyri í nýggjum og góðum hølum á Kambsdali.

samstarvaði JT Electric við Oilwind í Vágum. Ætlanin var alla tíðina, at hendan ætlanina skuldu gerast "undirsjóvarljósið" hjá JT-Electric.

Oilwind kom skjótt aftur við ljósinum, sum gjørdist upp aftur betri, enn roknað var við. Royndir vórðu gjørdar við ljósinum í alibrúkinum hjá Hera Thomsen í Norðragøtu, og tað riggaði avbera væl. Tá vórðu 10 ljósrør sett í framleiðslu til alarar ymsastaðni í Føroyum.

Tá ið hetlendingar og skotar hoyrdu um hesi nýggju ljósini, vóru teir skjótir at bíleggja ikki færri enn 160 ljós. Norskir alarar komu beint í hølunum á teimum.

Navnið, JT Electric, varð klistrað á lampurnar uttan nakað kjak, tí alt mátti henda so skjótt. Eitt ár seinni varð navnið tinglýst sum handilsnavn hjá Jóannes Thomsen P/F.

### Endurnýggja alla tíðina

Í dag er JT Electric ein framkomin fyritøka. Teir hava verið fyrstir á marknaðinum í mongum lutum, og áhaldandi ídni og vilji at gerast upp aftur betri merkist væl á starvsfólkunum.



Rúni Petersen er leiðari á framleiðsludeildini.

"Faroe Business Report" sigur í seinastu útgávuni um fyritøkuna:

"Stødd í einum av heimsins harðasta havumhvørvi hevur fyritøkan gjørt vart við seg á altjóða stigi, tá tað kemur til undirsjóvarútgerð av ymsum slag, serliga sjónvarpsmyndatól til trolfiskiskap, og ljós og myndatól til alibrúk."

- Vit selja til Tasmania, Dubai, Russlands, og til grannalond sum Noreg og Ísland, sigur stjórin við blaðið.

Fyritøkan selir eisini til millum annað Skotlands og Hetlands.

### Ocean Cable

Millum mongu framleiðslurnar hjá JT Electric er sonevndi Ocean Cable. Hetta er ein kápil við vanligum førleikum, har fyritøkan hevur lagt styrkjandi tilfar í. Í fyrstu atløgu hevur tað verið brúkt til undirvatnsljós.

- Har hava vit fingið staðfest, at vit sum einasta fyritøkan á marknaðinum, hava eina ljóskeldu, sum hongur í sjálvari streymveitingini. Har nýtist ongin annar eyka endi. Hon heldur væl. Hátturin, vit hava gjørt kápilin, ger, at hann tolir føroysku umstøðurnar, sigur Rúni Petersen, leiðari á framleiðsludeildini hjá JT Electric.

Kápilin verður framleiddur í fýra styrkjum/dimensjónum, har ein verður nýttur til undirvatnsljós, ein annar verður nýttur til vanliga streymveiting og so framvegis. Kápilin verður seldur í Føroyum, Skotlandi og Hetlandi.

### Ocean Camera

Hetta er eitt einfalt svart/hvítt analogt myndatól, sum serliga er gjørt at hyggja uppeftir fyri at halda eyga við fóðringini. Myndatólið verður sett




Trolmyndatól úr vinstru: 2006, 2008 og 2010. Í tí seinasta er tað serliga innmaturin, sum er broyttur, tí nú ber til at samskifta við myndatólið, meðan trolað verður.

undir fiskin, og so sært tú á einum skermi, um fiskurin er mettur.

- Men av tí, at hetta er eitt púra vanligt myndatól, so kanst tú nýta tað til alt. Tú kanst til dømis seta myndatólið á ein súgvikopp niðast á einum ringi, og so ber til at síggja, um nógvur deyður fiskur liggur í tí umráðnum, sigur Rúni Petersen.

**Fóðurflaki**

JT Electric hevur eisini gjørt fleiri fóðurflakar. Rúni Petersen sigur, at prinsippið við hesum flakunum er væl dámt.

- Vit hava júst nú leverað ein av heimsins størstu flakum til Faroe Farming í Suðuroy. Sæð úr einum grønum sjónarhorni er hetta eitt sindur idealistiskt. Tú tekur eitt skip, sum ikki longur er í nýtslu. Tað fært tú fyri ein rímiligan pening, tekur motor og alt úr, og so byggir tú eina fóðurskipan niðurí, greiðir Rúni Petersen frá.

Her fáa alibrúkini ein fóðurflaka úr tjúkkum stáli, og sum kann liggja í vánaligum veðri. Orsøkin til at menn vilja sleppa av við skipið er jú ikki, at skipið er tært. Tað kunnu vera heilt aðrar grundir.

- Vit hava eisini bygt eina fóðurstøð til Gøtuvík, sum mann vera eitt tað harðførarsta aliøkið í Føroyum, men tað riggar frálíka væl, sigur hann.

JT Electric hevur gjørt eina fóðurstøð til Bakkafrost, og hendan støðin liggur á Funningsfirði. Nú er triðja skipið - ella fóðurflakin so handaður Faroe Farming í Suðuroy.

**Undirvatnsljós/ocean light**

Undirvatnsljós er ljós, sum JT Electric framleiðir til alifyritøkur. Hetta er undirvatnsljós til laksaaling. Ljósið útsetir kynsbúningina, og summi vilja vera við, at matarlysturin økist, men tað er ikki vísindaliga prógvað. Men tað tykist greitt, at kynsbúningin verður útsett, og tað ber í sær, at laksurin veksur meira og betur, áðrenn hann verður tikin. Undirvatnsljósið verður mest selt í Føroyum, Hetlandi, Orknoyggjum, Skotlandi og Íslandi.

**Trolmyndatól**

Her eru vit inni á nøkrum heilt serligum, tí ongin annar í heiminum framleiðir trolmyndatól uttan júst JT Electric. Í 2006 framleiddu teir fyrsta trolmyndatólið, men longu í 2008 komu teir á marknaðin við einum nýggjum. Síðani eru upp aftur nýggjari komin. Trolmyndatólið, sum teir nýta í dag, kann samskifta við manningina á brúnni, og til ber at síggja livandi myndir.

Tað er ikki sum at siga tað at fáa eitt myndatól at halda í ógvuliga tungum fiskireiðsskapi sum troli og trolreiðskapi. Og tað er eisini ein av avbjóðingunum hjá JT Electric. Men væl hevur borið til, tí manningarnar eru væl nøgdar við trolmyndatólið.

Leiðarin á framleiðsludeildini er bjartskygdur:

- Eg vænti, at um 10 ár standa vit á trimum tryggum stúttum. Vit hava alivinnuna, fiskivinnuna, og vinnuna á landi, sigur Rúni Petersen.

Nærmastu samstarvsfelagar hjá JT Electric eru Vónin, Bakkafrost, Petur Larsen, sum er serfrøðingur í rustfríum, K. J. Hydralik og Mekanik í Danmark, sum hevur føroyskan eigara.

Í dag arbeiða umleið 25 fólk hjá JT Electric.

tekstur og myndir: **GRÆKARIS D. MAGNUSSEN** *-PRESS*



Kári á Torkilsheyggi, tekniskur ábyrgdari av trolmyndatólinum, her saman við Anitu Gundorph.

Ein printpláta, gjørd hjá JT Electric.

# Føroyingar kunnu gera printplátur

## Kári á Torkilsheyggi byrjaði á sinni hjá JT Electric við tí endamáli at gera eina printplátu.

Í fimm ár hevur hann arbeitt við at ment eina serliga printplátu, og tað arbeiðir hann partvíst framvegis við. Men sum ábyrgdarhavari á trolmyndatólinum fæst hann eisini við sjálva menningina av trolmyndatólinum.

- Eg eri við til at innsavna tilfar um, hvussu tú kanst brúka eitt myndatól í trolinum, hvat er gott, og hvat kanska er minni gott. Soleiðis flyta vit okkum alla tíðina. Tað sum kann vera snilt her á Kambsdali, kann jú vera óviðkomandi á troldekkinum, sigur Kári á Torkilsheyggi.

Hann vísir á, at tað hevur týdning at nýta røttu amboðini ella tingini til myndatólið, tí arbeiðsumstøðurnar á troldekkinum kunnu vera ógvusligar. Trolini eru stór, nógvir veirar og so framvegis.

**Printpláta**

Kári á Torkilsheyggi byrjaði at arbeiða við og menna eina printplátu, sum nú situr í trolmyndatólinum. Ein fjarstýring situr eisini í. Men seinastu tvey árini hevur nógv verið arbeitt við at fáa tingini nóg sterk.

- Nú eru vit so komin hagar, at vit hava fleiri enn hundrað eindir úti, og eg haldi meg bara vita um eitt, sum ikki riggar sum tað skal, sigur hann.

Hann hevur útbúgving úr Danmark. Har hevur hann lært bæði at umvæla og at gera printplátur, sum hava ávísar uppgávur.

- Ofta ræðast fólk printplátur og halda tað vera nakað, sum tú bara keypir. Men tann hugburðurin er púra skeivur, haldi eg. Um tú veitst, hvat tú vilt, so er tað als ikki so langur vegur. Er uppgávan greið, so kunnu føroyingar saktans sjálvir gera printplátur, heldur altso ábyrgdarhavarin á trolmyndatólinum hjá JT Electric, Kári á Torkilsheyggi.




# ELDRIVIN SPØL FRÁ IBERCISA

KSS ER UMBOÐ FYRI IBERCISA Í FØROYUM

**KSS** ER UMBOÐ FYRI **IBERCISA** Í FØROYUM, DANMARK, GRØNLANDI, SVØRÍKI, ONGLANDI, SKOTLANDI, ÍRLANDI, ÍSLANDI OG NORRA.

## FLEIRI FYRIMUNIR, LÆGRI KOSTNAÐUR

Eldrivnu spølini frá Ibercisa eru at finna umborð á yvir 120 trolarum kring heimin. Spølini hava fingið avbera góð ummæli. Spølini hava minni tørv á orku, og eru harvið bíligari í rakstri og meira umhvørvisvinarlig.







**Ynskir tú at hoyra meira um eldrivnu spølini?** Set teg í samband við okkum.

+298 472030 KSS@KSS.FO WWW.KSS.FO

KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ



# TÍN TRYGD - ER TÍN ÁBYRGD!

Eru landgonguviðurskiftini trygg ?

Nýtir tú persónliga trygdarútgerð ?

Er bjargingarútgerðin tøk og í lagi ?

Halda tit bjargingar- og brandvenjingar regluliga?

Yvirheldur tú kravdu hvílutíðina ?

- eisini vit vilja,
at tú ert trygg/-ur!

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sjóvinnustýrið . Inni á Støð 22 . Postrúm 28 . 370 Miðvágur . Tlf 35 56 00 . Fax 35 56 01 . Teldupostur fma@fma.fo . Heimasíða www.fma.fo

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** -*PRESS*



16. desember skrivaðu Maskinmeistarafelagið og KAF undir nýggja tvey ára semju.

**Nýggja semjan millum KAF og Maskinmeistarafelagi inniber, at lønin hækkaði 1,03 prosent við afturvirkandi megi frá 1. oktober 2015, og 1. oktober í ár hækkar hon aftur 1,9 prosent.**

# Semjan kom í hús

Beint undan jólum gjørdi Maskinmeistarafelagið semju við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF) um nýggjan tvey ára sáttmála galdandi frá 1. oktober 2015 til 1. oktober 2017.

Semjan inniber, at lønin hækkaði 1,03 prosent við afturvirkandi megi frá 1. oktober 2015, og 1. oktober í ár hækkar hon aftur 1,9 prosent.

Aðrar ábøtur á sáttmálan eru eisini gjørdar, umframt at ein arbeiðsbólkur skal setast at arbeiða við veitingartrygdini hjá SEV.

Miðað verður ímóti, at arbeiðsbólkurin verður liðugur við sítt arbeiði 1. oktober í ár

peturlarsen.fo

# VEITARI TIL FISKIÍDNAÐIN SÍÐAN 1972



**SØLA OG TÆNASTA VIÐ:**
- Nýggjum og brúktum maskinum
- Umvæling
- Eykalutum
- Viðlíkahaldi
- Ráðgeving

**VÆL ÚTGJØRD SMIÐJA:**
- Alt vanligt smiðjuarbeiði
- Størri og krevjandi uppgávur

**VÆL ÚTGJØRD GOYMSLA VIÐ:**
- Rustfríum tilfari
- Ketum
- Tannhjólum
- Legum
- Gearmotorum

NING · Tel +298 215 315

BAADER Food Processing Machinery
fomaco FOOD MACHINERY COMPANY
Ubro SystemPac
euskan++ FISH HANDLING SYSTEMS

Bakkavegur 8
530 Fuglafjørður
Tel 775 775
pl@pl.fo
www.peturlarsen.fo

peturlarsen

tekstur: **INGOLF S. OLSEN** -*PRESS*



- Trygdargrunnurin verður brúktur sum eitt satt sjálvtøkuborð av reiðarum, sum eiga bæði skip og virki, og sum dumpa avreiðingarprísin fyri at skora kassan í góðskingarliðnum, sigur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara og Navigatørfelag. *Mynd: Grækaris D. Magnussen*

# Rán ella stuðul úr Trygdargrunninum

Reiðarar og virki misbrúka Trygdargrunnin at rinda løn til manningarnar, tí ongin virkandi uppboðssøla er at tryggja rætta avreiðingarprísin. Tað heldur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara og Navigatørfelag.

Tann sonevnda vertikala integrasjónin, har virki og skip hava sama eigara, er ein vanlukka fyri príssetingina á føroyska fiskamarknaðinum og fyri endamálið við Trygdargrunninum.

Tað heldur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara og Navigatørfelag.
- Endamálið við Trygdargrunninum er at tryggja skipara og manning eina minsturløn, um túrurin vegna vánligan fiskiskap og/ella vánaligan prís miseydnast.

- Men í dag er støðan tann, at so at siga ongin fiskur fer um uppboðssøluna, tí reiðarar eiga bæði skip og loyvi og nú eisini móttøkuvirkini. Og tá er gaman í hjá reiðaríunum sjálv at áseta prísin á feska fiskinum fyri at økja vinningin í góðskingarliðnum mest møguligt.

- Og tað er jú ikki so farligt, um ásetti avreiðingarprísurin er í lægra lagi, tí Trygdargrunnurin er jú har at tryggja løn til manningina, sigur Annfinnur Garðalíð bersøgin.

**Kalt og kyniskt**

Hann heldur, at manningarfeløgini mugu gera okkurt við støðuna, sum hann ikki ræðist at kalla rán úr Trygdargrunninum.

- Talan er um eitt kalt og kyniskt roknistykki. Eigarin av skipi og virki

veit, at tess minni avreiðingarvirðið er, tess minni skal rindast í Trygdargrunnin. Hinvegin er lutfallið øvugt við útgjaldinum, tí tess minni skipari og manning fáa burtur úr túrinum, tess størri er útgjaldið úr grunninum. At gera sær dælt av hesum, sum tað í stóran stíl verður gjørt, er onki minni enn eitt rán, sigur Annfinnur Garðalíð.

**Trýsta politkararnar**

Tað sum manningarfeløgini sambært honum í fyrsta lagi eiga at gera, er at leggja trýst á politiska myndugleikan, soleiðis at best møgulig trygd verður fyri reellum prísum, tá avreitt verður.

- Tað skal lóggevast soleiðis, at allur fiskurin, ella í minsta lagi tveir triðingar av øllum fiskinum, sum er fiskaður undir Føroyum við føroyskari manning, verður seldur á uppboðssølu.

- Og um øll manningin ikki er føroysk, eigur inngjaldið í Trygdargrunnin at verða hægri. Tí royndirnar vísa okkum, at reiðarar brúka útlendska manning til at trýsta lønarútreiðslurnar niður – eisini sjálvt um føroyskir sáttmálar verða brúktir. Tí skal tað eisini framhaldandi vera eitt stálsett krav frá okkum, at bert sáttmálar millum núverandi manningarfeløg og Føroya Reiðarafelag verða brúktir, sigur formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

**Hægri inngjald**

Afturat kravinum um, at mest møguligt skal avreiðast um uppboðssølu, heldur hann, at hægri inngjald í Trygdargrunnin eigur at roknast av tí partinum, sum sleppur uttanum uppboðssøluna.

- Gjaldið skal vera so mikið stórt, at tað helst ikki skal loysa seg at fara uttanum uppboðssøluna, sigur Annfinnur Garðalíð.

At vertikala integrasjónin trýstir avreiðingarprísin niður, hevur hann fleiri dømi um.

- Fyri avreiðingar í Føroyum hava vit sæð prísmun upp í heilar tvær krónur kilo millum tað, sum virkini lata sínum egnu skipum samanborið við prísin á uppboðssøluni á Fiskamarknaði Føroya. Tað sigur seg sjálvt, at tá er okkurt rívandi galið, sigur hann.

**Undirprísur**

Annfinnur Garðalíð nevnir eisini sum dømi svartkalvafiskiskapin hjá einum føroyskum skipi í Grønlandi, har avreitt varð fyri undirprís.

- Sama reiðarí átti eisini eitt innfrystingarskip, sum tók ímóti svartkalvanum. Prísurin var 15 krónur kilo, samstundis sum at marknaðarprísurin í Føroyum var 32-33 krónur kilo.

- Hetta er eitt dømi um grova spekulasjón, men reiðarin tjenar jú kassan og veit, at Trygdargrunnurin altíð tekur um endan, tá manningarhýran fer niður í onki. Trygdargrunnurin verður brúktur sum eitt satt sjálvtøkuborð av slíkum reiðarum, sigur hann.

Lítið hjálpir hjá manningunum at streingja á slíkar reiðarar, um at taka sær betri partar fyri.

- Eg fekk upplýst frá manningini, at tá hon hótti við stinga í sekkin, um hon ikki fekk ein prís, sum var á støði við tann á føroyska marknaðinum, tá hækkaði kiloprísurin úr 15 í 16 krónur, sigur Annfinnur Garðalíð.

Sí eisini oddagreinina.





**Eik Banki P/F**, Tel. 348000
eik@eik.fo , www.eik.fo

Eik
Tað snýr seg um teg



Annfinnur Garðalíð formaður

# BROT ÚR DAGBÓK

**7-10-2015**
**Sáttmáli**
Samanskriving av sáttmála. Ein 8-mannabólkur var í Skálavík og samanskrivaði nýggja sáttmálan millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag.

**22-10-2015**
**Nevndarfundur**
Nevndarfundur í FSN.

23-10-2015
FMU-fundur
FMU hevði nevndarfund hjá MF. Umrøddu ITF/FMU-inngjøld.

**27-10-2015**
**Páll Nielsen**
Fundur við Páll Nielsen. FSN, MF og SF høvdu fund við Páll Nielsen viðv. dóminum í FG og vegna SSL. Kl. 10.00: Vinnuháskúlin.
Fundur í Maritima Útbúgvingarráðnum.

**28-10-2015**
**Starvsfólkafundur**
1. Starvsfólkafundur í FSN. Kl. 09.30: Fundur millum Páll Nielsen og FSN og ein lim hjá FSN vegna FG.

**29-10-2015**
**H-Dygd**
H-Dygd byrjar at skifta vindeyguni hjá FSN. Klima.fo skiftir ventilasjón.

**16-11-2015**
**Fundur í FSN**
Sáttmálasamráðingar millum FSN – LND Magnus Heinason.

**18-11-2015**
**Fundur í FSN**
Fundur millum FSN og Starvsmannafelagið (samráðingarrættur).

**23-11-2015**
**Blaðfundur**
Fundur í FSN. Blaðnevndin kom saman at tosa um komandi útgávu av Mið og Magn.

**24-11-2015**
**Fundur í FSN**
Formenninir í manningarfeløgunum fundast um nýggju kunngerðina um makrel/sild/svartkjaft. Eftir hendan fundin varð tosað um ymisku frádráttirnar, sum eru nevndir og ikki nevndir í grein 17 í sáttmálanum millum manningarfeløgini og FR.

**4-12-2015**
**Fundur**
Fundur millum FSN, MMR, FT og KVF. Á skránni var sendinetið til skip.



Næmingavitjan.

**9-12-2015**
**Vitjan av S3.**
Fundur millum FSN, MMR og Vodafon um sendinetið til skip.

**14-12-2015**
**Nevndarfundur**
Kl. 9.30: Nevndarfundur hjá FSN, fyrireikan av aðalfundi. Kl. 16.00: Fundur við SSL um persónsmál.

**15-12-2015**
**Stýrisfundur**
Kl. 9.30: Styrisfundur í Trygdargrunninum. Kl. 13.00: Fundur í Frunninum fyri óarbeiðsførar fiskimenn, viðgerð av umsóknum um stuðul.



Fundur við VMR - Vodafone.




Rutunetið hjá Faroe Ship bjóðar føroyingum bestu inn- og útflutningsmøguleikarnar. Vikuliga sambandið við flutningsmiðstøðirnar í grannalondunum og Norðurevropa tryggjar fjølbroytta atgongd til útheimin og tryggan innflutning.

**Lómur og Blikur geva nýggjar møguleikar**
Nýggjur útflutningsmøguleiki fríggjakvøld til Århus við Lómi og Bliki, sum nú røkja farleiðina millum Føroyar og Skotland og Føroyar, Danmark, Svøriki og Pólland.

FAROE SHIP

# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum



Páll Hansen formaður

## BROT ÚR DAGBÓK

**5-6-10-2015**
**NMF-fundur í Oslo.**
Hálvárligi fundurin hjá norðurlendsku samtøkuni av maskinmeistarafeløgum varð hildin í Oslo 5.- og 6. oktober.

**7-8-10-2015**
**Skálavík**
Umboð fyri manningarfeløgini og Reiðarafelagið í Skálavik at samanskriva semjurnar til ein nýggjan felags sáttmála. Arbeiðið gekk sera væl, men varð ikki heilt liðugt orsakað av, at nakrir frádráttir skuldu kannast nærri.

**14-10-2015**
**MF**
Nevndin í felagnum møtti umboðum fyri lønardeildina, og báðir partar løgdu síni krøv fram til komandi lønarsamráðingar. Sáttmálarnir, sum gingu út 1. oktober, vóru alment lønt á landi og Magnus Heinason.

**21-10-2015**
**MF**
Samraðingar FMA. Partarnir møttust aftur, og komu nærri inn á krøvini hjá hvørjumøðrum. Funnu útav, hvat mann kundi semjast um, og hvat partarnir vóru samdir um at vera ósamdir um.

**23-10-2015**
**MF**
Fundur í Faroese Maritime Unions. Tosað varð um sáttmálasamráðingar í Íslandi, um manning vi skipum hjá Eimskip/Samskip. Nøkur av hesum eru undir føroyskum flaggi. Eisini bleiv tosað um samstarv við onnur norðurlond um møgyliga at fáa ein ITF-inspektør at vitja her av og á.

**26-10-2015**
**MF**
Sáttmálasaráðingarnar millum KAF og MF byrjaðu hendan dagin við at báðir partar løgdu skjal fram við krøvunum. Krøvini vórðu síðan gjøgnumgingin. Nakað av kjaki var.

**27-10-2015**
**MF**
Fundur millum Páll Nielsen og MF, FSN og Starvsmannafelagið, nú dómur er fallin í Fasta Gerðarrættinum um sigling 1. jóladag og langafríggjadag. Fundurin snúði seg um, hvørt feløgini skuldu seta fram eitt felags krav ella hvør sær.

**30-10-2015**
**MF**
Nevndarfundur. Kunnað var um keypið av Lív, og hvar mann var staddur í løtuni í keyps tilgongdini. Eisini varð tosað um Asbjørn Senior - og at semja enn ikki er á øllum lønar spurningum. Fundur í Fiskivinnuráðnum: Fundurin snúði se um broyting av fiskiskapinum hjá skipum undir føroykum flaggi í Syðurstillahavinum.

**2-11-2015**
**Blaðfundur**
Eftirmeting av seinasta blaði. Greinar til komandi blað.

**3-11-2015**
**MF**
KAF-MF 2. Samráðingarfundur. Á hesum fundinum greiddu partarnir nærri frá teimum ymisku krøvunum. Partarnir vóru samdir um at gera nærri útgreiningar og kostnaðarmeting um tey mál, mann hevði tosað um.

**4-11-2015**
**MF**
FMR-MF 3. Samráðingarfundur. Nakað bleiv tosað um yvirlitið hjá monnum oman fyri 10. lønarflo. Partarnir samdust um at fara undir at skriva eina semju.

**9-11-2015**
**MF**
KAF-MF 3. Samráðingarfundur. Partarnir komu fram til eina semju um kostnaðarstøðið á teimum flestu krøvunum. Eisini varð komið inn á veitingarskylduna hjá SEV og eventuelt úrtíðararbeiði í tí sambandi.

**17-11-2015**
**Fíggjarmalaráðið**
Undirskrivað semju millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið um sáttmálar um almentsettar maskinmeistarar á landi og maskinmeistarar við Magnusi Heinason.

**18-11-2015**
**MF**
KAF-MF 5. samráðingarfund. Á hesum fundi bleiv tikið samanum, og hugsað varð um at byrja at skriva eina semju. Men partarnir skiltust uppá, at MF skuldi koma við einum uppskoti.

**23-11-2015**
**Blaðfundur**
Press kunnaðu, hvussu gekst við at fáa tilfar til komandi blað.

**24-11-2015**
Fundur millum manningarfeløgini um løgtingslóg fyri makrel, norðhavssild og svartkjaft - og botnfisk í Barentshavinum. Roynt var at finna eitt felagsstøði í málinum. Fingu eitt gott prát um evnið. Vóru samdir um tað mesta.

**27-11-2015**
**MF**
Nevndarfundur. Kunnað bleiv um gongdina í málinum um Asbjørn Senior. Esini varð tosað um grein 17 frádráttir í felagsreglunum við Føroya Reiðarafelag. Til støðutakan: Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskap eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti. Málið um Silver Lake og Silver River var eisini uppi. Semja var um, at arbeiða víðari við málinum. Semja var um at siga sáttmálan við Polar Princess upp.



**10-11-2016**
**Fiskimálaráðið**
Fundur um kunngerð um skipan av fiskiskapi eftir svartkjafti hjá skipum undir føroyskum flaggi í 2015. Og uppskot um avgjøld av svartkjafti í 2015.

**11-11-2015**
**MF**
4. samráðingarfundur. Partarnir vóru samdir um eina semju, tó skuldi lønartalvan líka eftirkannast, áðrenn undirskrivað verður. Seinnapartin: Fundur millum FF, MF og Páll Nielsen um støðuna í málinum um Asbjørn Senior.

**1-12-2015**
**Fiskivinnuráðið**
Hoyring í Fiskivinnuráðnum, Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskap eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti - og botnfiski í Brentshavinum.

**3-12-2015**
**MF**
Fyrrapartin: Fundur við Páll Nielsen um tulking av seinastu broytingunum í manningarlógini - serliga um lækkandi framtøkumegi. Seinnapartin: Sáttmálasamráðingar við KAF, 5. fundur. Partarnir arbeiddu við at samanskriva tað, mann er vorðin samdur um, men tað lukkaðist ikki at verða lidnir við nakra semju.

**10-12-2015**
**S&K**
Nevndin í sp/f Fakfelag hevði nevndarfund. Á skránni var keypspstilgongdin í Lív.

**14-12-2015**
**MF**
KAF-MF, 6. samráðingarfundur. Stuttur fundur, har partarnir vórðu samdir um at gera eina semju. Hon fylgir í høvuðsheitum leistinum, sum longur er lagdur á arbeiðsmarknaðinum. Skal tó góðkennast av nevndini í KAF, áðrenn hon verður undirskrivað.

**15-12-2015**
**Als-húsið**
Fundur í Trygdargrunninum, har kunnað varð um hagtøl fyri inn- og útgjøld í 2015. Kunnað varð eisini um nýggju KT-skipanina. Seinnapartin: Fundur í fiskivinnuráðnu. Á skránni vóru tríggjar kunngerðir um fiskiskap eftir kongafiski í 2016. Eftir hendan fundin hevði sp/f Fakfelag fund við landsstýrismannin í vinnumálum um tilgongdina við Lív-keypinum.

**16-12-2015**
**KAF**
Maskinmeistarafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið skriva undir semju um at endurnýggja sáttmálan millum artarnar. Talan er um ein tvey ára sáttmála frá 1. oktober 2015 til 1. oktober í 2017. Umframt lønarhækkingar eru eisini aðrar ábøtur og dagføringar gjørdar í sáttmálanum.







Rein góðska úr norður Atlantshavi
www.cig.fo









Norðhavnin 8 · Postboks 329 · FO-726 Ánirnar · Føroyar
Tel. +298 20 70 00 · Fax +298 20 70 10
T-postur: cig@cig.fo · www.cig.fo

tekstur: Grækaris D. Magnussen -*PRESS*

BRENNIDEPILIN



# Kristen Friis

**Føddur:** 24.12.1968

**Parlagsstøða:** Giftur við Lailu Friis. Eiga tvíburarnar Mariu og Hanus.

**Útbúgving:** Skipari

**Starv:** Skipari á Skoraberg

**Hvussu heldur tú útlitini vera hjá navigatørum í dag?**
Í fiskivinnuni undir Føroyum sær betur út aftaná nøkur vánalig ár. Men í oljuvinnuni, har nógvir føroyingar starvast, sær ikki gott út.

**Hvør er størsta avbjóðingin hjá einum navigatøri?**
Tað er at fylgja við fiskarínum, lógum og tí tøkniliga innan fyri økið, sum tú starvast í.

**Nær vart tú fyrstu ferð til skips og við hvørjum?**
24. desember 1983 við Lómi.

**Hvat hevur verið longsti túrur til skips higartil?**
Við Polar Princess í Grønlandi í fýra mánaðir í 1995.

**Hvat gert tú í frítíðini?**
Havi bát og neyst, so har fer nakað av tíð. Eitt sindur av mosjóns-fótbólti fríggjakvøld. Annars er tað hugni saman við familjuni og góðum fólki, tað er balsam fyri skinn og sinn.

**Hvat slag av bili hevur tú?**
Suzuki S Cross.

**Hvørja teldu hevur tú?**
Toshiba

**Hvør er besta bókin, tú hevur lisið?**
Eri ikki nakar lesari, so tey føroysku bløðini man vera tað nærmasta.

**Hvønn sang/lag dámar tær best?**
Hanus G. Johansen hevur altíð ein góðan.

**Hvør er besti filmur, tú hevur sæð?**
Ikki nakran ávísan, men ein svenskur krimi plagar at hilnast.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum?**
Tá familjan hevur tað gott - og eitt gott hál. Tá kan mann ikki klaga. Og í apríl, tá VÍF vann greipuna, tað var stórt.

**Hvat kann øsa teg í gerandisdegnum?**
Smáligheit og fólk, sum ikki halda orð, tað havi eg tað ikki gott við.

NordikPENSJÓN

# Alt, sum tín pensjón eigur at vera

BANKNORDIK

Við NordikPensjón taka vit atlit til, at tú sum brúkari setir krøv til gjøgnumskygni og dygd. Og við NordikPensjón er tað leikandi lætt: Tú fært eitt greitt yvirlit í Netbankanum, har allar upplýsingar eru tøkar. Tú fært eina pensjón, sum tú hevur ávirkan á, og pensjónspakkin verður settur saman eftir tínum ynskjum og lagaður til júst tín tørv.

**0 krónur til umsiting**

Við Nordik360+ ella Nordik360Premium fara 0 krónur til umsiting.

**1 stað til tíni fíggjar-viðurskifti**

Við NordikPensjón fært tú betri yvirlit yvir tíni samlaðu fíggjarviðurskifti.

**2 pensjónir eru ikki líka**

Vit eru ikki líka, og tí eiga okkara pensjónir ikki at vera líka.

**Vælkomin til NordikPensjón**

**www.banknordik.fo/pensjon**



tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



- Eg síggi í stóran mun mín leiklut í arbeiðsbólkinum at vera garantur fyri, at vit leggja okkum eftir altíð at vera á støði við teir bestu, tá tað snýr seg um trygd og førleikar, sigur Pál Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

# Annfinnur og Páll býta sessir

**Annfinnur Garðalíð tekur nú sæti í Fiskivinnuráðnum, og Páll Hansen skal umboða manningarfeløgini í arbeiðsbólki, sum skal orða maritima strategi og politikk fyri Uttanríkis- og Vinnumálaráðið.**

Seinastu tíðina hevur Páll Hansen, formaður í Maskinmestarafelagnum, møtt á fundum í Fiskivinnuráðnum umboðandi Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag, men nú tekur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sæti í ráðnum.

Teir báðir hava gjørt eitt býti, soleiðis at Páll Hansen fram eftir skal umboða bæði feløgini í arbeiðsbólkinum, sum Poul Michelsen, uttanríkis- og vinnumálaráðharri, hevur sett at gera eitt uppskot til eina maritima strategi fyri Føroyar og orða ein yvirskipaðan politikk á økinum.



- Eitt, sum liggur mær nógv á hjarta, er at fáa strikað avreiðingargjaldið, sum verður lagt á føroysku avreiðingarnar av uppsjóvarfiski uttanlands. Tað avgjaldið er ein beinleiðis stuðul til føroysku uppsjóvarvirkini, sigur Annfinnur Garðalíð.

### Vil hava ávirkan

Fiskivinnuráðið er í fyrsta lagi ein hoyringspartur sum skal ummæla

lógaruppskot og kunngerðir, men Annfinnur Garðalíð ætlar tó at gera sína ávirkan galdandi í tann mun, hann fær høvi til tess.

- Eg havi nøkur hjartamál, har sessurin í Fiskivinnuráðnum kann verða gagnligur Eitt, sum liggur mær nógv á hjarta, er at fáa strikað avreiðingargjaldið, sum verður lagt á føroysku avreiðingarnar av uppsjóvarfiski uttanlands. Tað avgjaldið er ein beinleiðis stuðul til føroysku uppsjóvarvirkini. Tá føroysku skipini fiska tætt við landnyrðingsmarkið er upplagt at fara til Noregs at landa til ein betri prís. Prísurin í Føroyum er gjøgnumgangandi júst tað lægri, sum svarar til avreiðingargjaldið.

- Eitt annað týðandi mál, eg vil arbeiða fyri, er at fáa ein størri part av botnfiskaveiðuni um uppboðssøluna á Fiskamarknaði Føroya, so prísurin ikki verður dumpaður, tá virki og skip hoyra saman.

- Og so vil eg hava, at kyrrahavsloyvini koma aktivt við í puljuna í sambandi við tilrættisleggingina av okkara fiskivinnu og býtishandlarnar, sum hartil hoyra. Vit hava ikki fiskað av hasi kvotuni í áravís, so hví ikki vita, um vit okkurt árið kundu býtt hana um við til dømis tosk í Barentshavinum, sigur Annfinnur Garðalíð.

**Høgt støði**

Páll Hansen í sínum lagi hevur serligan áhuga í arbeiðnum hjá arbeiðsbólkinum, sum skal leggja lunnar undir maritima strategi og politikkin henni viðvíkjandi.

- Vit hava í fleiri ár sæð, at hugburðurin í politisku skipanini er gliðin, so vit í ov stóran mun hava hugsað um kappingarføri fram um trygd, tá tað snýr seg um at smíða lógir og reglur á maritima økinum. Hetta er eisini galdandi, tá vit hava lóggivið innan karmarnar á altjóða sáttmálum, sum vit eru partur í. Eg síggi í stóran mun mín leklut í arbeiðsbólkinum sum ein garant fyri, at vit leggja okkum eftir altíð at vera á støði við teir bestu, tá tað snýr seg um trygd og førleikar, sigur Páll Hansen, sum í grein aðrastaðir í blaðnum greiðir nærri frá sínum hugsanum.

## Fakta um Fiskivinnuráðið

**Fiskivinnuráðið er skipað við lóg, Løgtingslóg nr. 61 frá 10. mai 2000 um fiskivinnuráð, og hon sigur soleiðis um virksemið hjá ráðnum:**

**§ 3. Landsstýrismaðurin leggur týðandi fiskivinnumál og øll uppskot til lógir og kunngerðir, sum hava við fiskivinnuna at gera, fyri fiskivinnuráðið til ummælis. Fiskivinnumál og tilmæli, sum verða viðgjørd av øðrum nevndum sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, verða bert løgd fyri fiskivinnuráðið, tá landsstýrismaðurin heldur tað hava týdning fyri málsviðgerðina.**

**Stk. 2. Eitt og hvørt umboð í fiskivinnuráðnum hevur rætt til at fáa sjónarmið síni førd í fundarfrágreiðing ráðsins. Fundarfrágreiðingarnar verða sendar landsstýrismanninum.**

**Stk. 3. Fiskivinnuráðið kann eisini av sínum eintingum taka fiskivinnumál upp til viðgerðar og lata landsstýrismanninum sítt ummæli.**

www.mest.fo

EYKALUTIR

24/7 TÆNASTA – RING +298 79 11 00


Lætt at bíleggja umvegis telefon ella teldupost


24/7 tænasta


Størsta og besta goymsla í landinum



Sølubúð/goymsla í Havn, Runavík og á Skála


Vit koyra kring alt landið


Álítandi tænasta

MEST SHIPYARD

MEST P/F · J.C. Svabosgøta 31
P.O. BOX 65 · FO-110 Tórshavn
tel: +298 301100 · info@mest.fo

# FØÐINGARDAGAR

## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Marius Vilhelmsen, Klaksvík | 11/2-1956 | 60 ár |
| Sigurð Ólason, Strendur | 8/4-1956 | 60 ár |
| Jón Niclas Johannesen, Nes | 15/2-1966 | 50 ár |
| Kurt F. Jacobsen, Tórshavn | 25/2-1966 | 50 ár |
| André Johannesen, Vágur | 2/3-1966 | 50 ár |
| Eyðvardur Petersen, Sandur | 20/3-1966 | 50 ár |
| Jón Viðstein, Hoyvík | 29/3-1966 | 50 ár |
| John Fugløj, Klaksvík | 30/4-1966 | 50 ár |
| Rúni Gregersen, Runavík | 27/2-1976 | 40 ár |
| Terji Poulsen, Silkeborg | 20/3-1976 | 40 ár |
| Ólavur Hansen, Klaksvík | 23/3-1976 | 40 ár |
| Gunnleif Kristiansson, Kaldbak | 4/4-1976 | 40 ár |
| Kenneth Michelsen, Tórshavn | 4/4-1976 | 40 ár |
| Suni Gaard, Vestmanna | 8/4-1976 | 40 ár |

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Mannbjørn Vang, Miðvági | 13/11-1945 | 70 ár |
| Ernst Lamhauge, Glyvrar | 14/3-1946 | 70 ár |
| Atli Joensen, Toftir | 23/2-1956 | 60 ár |
| Henry Christiansen, Leirvík | 9/4-1956 | 60 ár |
| Joen Jacob A. Jacobsen, Vági | 24/4-1956 | 60 ár |
| Kári Holm, Tvøroyri | 3/4-1966 | 50 ár |
| Sigurd Helgi Jørgensen, Sørvági | 16/4-1966 | 50 ár |
| Olvheðin Jensen, Sørvági | 21/2-1976 | 40 ár |
| Heri Ajvind Hentze, Sørvági | 29/4-1976 | 40 ár |
| Berit Hovsgarð, Hov | 24/4-1976 | 40 ár |
| Símun Heimistovu, Klaksvík | 8/2-1986 | 30 ár |
| Karin Mikkelsen, Sørvági | 10/2-1986 | 30 ár |
| Sverri Jacobsen, Norðragøta | 29/3-1986 | 30 ár |
| Poul Henning Poulsen, Sumba | 2/4-1986 | 30 ár |
| Dánial Jákup Toftum, Vestmanna | 21/4-1986 | 30 ár |

## Áheitan!

Bæði Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið hava ávísar trupulleikar við ófullfíggjaðum limalistum. Tað eru serliga upplýsingar um teldupostadressur, sum vanta.
Við hesum heita feløgini tí á limirnar, sum ikki longu hava gjørt tað, um at senda teimum limaupplýsingarnar – navn, bústað og teldupostadressu.

Upplýsingarnar til Føroya Skipara- og Navigatørfelag skulu sendast til **fsn@fsn.fo.**

Upplýsingarnar til Maskinmeistarafelagið skulu sendast til **mf@mf.fo**.

## AÐALFUNDUR Í MASKINMEISTARAFELAGNUM

Aðalfundurin hjá Maskinmeistarafelagnum verður á grækarismessu, 12. mars, seinnapartin.

**Nærri verður lýst um tíð stað.**














# effo orkar betur...

Við størsta partinum av tangagoymslunum í Føroyum, er Effo høvuðsveitari av orku til føroysku vinnuna. Somuleiðis tryggja vit orku til húsarhaldini og stovnar. Kring landið eru 14 av 24 bensinsølustøðum í okkara kervi.

Skipini bunkra hjá okkum í best útgjørda terminali í Norður-atlantshavi. Og hvørja ferð eitt flogfar lyftir seg upp frá vøllinum í Vágum, hevur tað frammunundan tikið brennievni frá okkum.

effo føroya orkufelag

Tel 34 35 00 www.effo.fo

LÍV er høvuðsstuðul hjá Rescue LÍV

# LÍV ger teg tryggari á sjónum




## Manningin á Rescue LÍV mælir til, at tú fylgir hesum leisti, um tú kemur í havsneyð:



1. Gev boð gjøgnum **VHF rás 16.**
- Um hetta ikki ber til so ring: **1-1-2** (alarmsentralin)
- Eisini ber til at ringja: **35 13 00** (MRCC)
- Uppgev altíð eitt fartelefonnummar

2. Lurta á VHF rás 16 og hav fartelefonina tøka
- So fáa vit samskift við teg

Jens Hansen
*Umsjónarmaður á Rescue Lív.*